# Hann strýkur yvir ægin blá

**Út móti 200 førum pløgdu Vestmannasund sunnan undan Fútakletti inn á Vestmanna, har bátastevna varð hildin leygardagin. Eisini nógvir landkrabbar leitaðu sær ymsar vegir til Vestmanna hendan dagin**

BÁTASTEVNA
*Orð: Edvard Joensen*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Luttkaraskarin á Bátastevnuni Kjalarvatn i Vestmanna var rættiliga fjølbroyttur*

Bátastevnan Kjalarvatn, sum er vorðin afturvendandi tiltak í Vestmanna, eydnaðist væl, siga fyrireikararnir. Stevnan í ár var tann størsta, sum verið hevur. Einir 180-190 bátar við samlaðum manningartali upp á umleið 900 luttóku, eins og nógv onnur fólk eisini komu til Vestmanna í sambandi við stevnuna.

Vestmanna Ítróttarfelag skipar fyri bátastevnuni, sum nú er komin fyri at verða. Ágóðin av samlaða tiltakinum fer til nýggja kappróðrarneystið, vestmenningar eru í ferð við at gera sær, sigur Jógvan Emil Nielsen, nevndarlimur í kapróðrardeildini hjá VÍF.

Hann sigur, at sjálv bátastevnan sum so gevur ikki nakrar pengar í kassan, tí har er luttøkan ókeypis, og boðið verður okkurt ókeypis til luttakararnar, tá teir koma til lands. Men so eru onnur tiltøk, sum sølubúðir og serliga dansurin um kvøldið, sum ætlandi skulu geva felagnum nakrar krónur at leggja í neystið og eisini til nýggjar bátar.

Undirtøkan tykist bara at vaksa, sigur Jógvan Emil Nielsen. Í fjør vórðu umleið 130 bátar skrásettir við umleið 600 fólkum. Enn hevði hann ikki fingið endaliga talið fyri í ár, tá Sosialurin tosaði við hann eftir stevnuna, men manningartalið var nú komið upp á 900, og bátarnir vóru umleið 180 - 190.

– Og so koma nógv onnur eisini til Vestmanna í sambandi við stevnuna, sigur Jógvan Emil Nielsen. Einir 15 campingvognar stóðu á havnarlagnum. Ein rúgva av motorsúklum vóru á útferð í Vestmanna hendan dagin. Gongufeløg ymsastaðni frá komu í felag úr Saksun um fjøllini til Vestmanna, eins og eisini rossafólk høvdu leitað sær hendanveg, greiðir hann frá.

Og so vóru tað øll hini, sum komu í dans um kvøldið ella bara at síggja hetta stóra tiltakið.

Fólk hevði tað bæði stuttligt og hugnaligt í Vestmanna leygardagin og út á náttina.

Allastaðni á havnarlagnum, har bátarnir lógu, var nógv lív í. Fólk gekk skútu av skútu at vitja, práta, reypa og syngja. Onkur treiv soleiðis hissini í harmonikuna ella tað, sum fyri var, og so gekk tað bara upp á stás.

Eisini uppi í bygdini var lívligt, har fólk gingu húsagongd inn í millum vitjnanir umborð á bátum og skipum.

Og alt gekk siðiliga og friðaliga fyri seg, sigur Jógvan Emil Nielsen. Fólk eru skilagóð, og eingi óhapp eru fráboðað til fyrireikararnar, sigur hann.

Hann nevnir, at fleiri av bátunum, sum lógu við bryggjuna, høvdu net spent millum sín, um tað skuldi hent, at onkur var áhalsin. Hetta metir hann fer at vera ein áheitan á luttakararnar eitt annað ár at hava við sær.

Tá so nógv fólk hittist, kann altíð okkurt óhapp væntast, og tí høvdu fyrireikararnir eisini avtalað við samarittarnar hjá Reyða Krossi at vera á staðnum alla náttina. Men sum skilst varð ikki brúk fyri teimum.

Jógvan Emil Nielsen metir, at tað mest av fólki var í Vestmanna á bátastevnuni, mundu eini 1.200 fremmandafólk vera í bygdini.



*Tá eg verði stórur, tá sleppi eg við..........*



*Gott at hava góðan loðs. Veteranurin á Sundinum, Ólavur, leiddi armaduna undan Vágalandinum inn á Vestmanna*



*Hasum skal eg við næstu ferð..........*



*Klárt at skriva upp*



# Landsstýrismaður í døpurhuga

**Landsstýrismaðurin við mentamálum veit eftir øllum at døma ikki síni livandi ráð, í stríðnum á Føroya Fornminnissavnið. Tað ber ikki til at konservera málið meira. Tað má ruddast av vegnum eina ferð fyri allar, sigur hann**

ÓSEMJA
*Edvard Joensen*



*Hvørjum flaggað varð fyri á Føroys Fornminnissavnið seinnapartin mánadagin, er ivasamt. Landsstýrismaðurin gongur við óútgrivnum ætlanum. Fyrrverandi landsantikvarurin vil lítið siga, og landsantikvarurin sjálvur er mestsum stummur*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsstýrismaðurin við mentamálum, Jógvan á Lakjuni, er rættiliga tigandi um stríðið á Fornminnissavninum. Hann vil onga viðmerking gera uttan hana, at hann hevur lurtað eftir pørtunum og veit ikki enn, hvussu málið skal loysast. Allir partar hava meira ella inni fingið munnkurv, og eingin vil gera nakrar serligar viðmerkingar.

Jógvan á Lakjuni sigur, at hann miðar eftir at koma við einum útspæli í vikuni. Hvat hann hugsar um, er líka loyndarfult, sum alt annað, sum landsstýrismaðurin hevur í kvittanum í hesum málinum.

– Onga viðmerking, er standardsvarið, tá komið verður ov nær við spurningum.

Ætlanir landsstýrismansins eru líka ókendar, sum fornleivdir, ið liggja fjaldar undir mold og bíða eftir, at onkur fornfrøðingur byrjar at grava.

Hann ásannar kortini, at hann verður noyddur at gera okkurt munagott fyri at fáa enda á hesum stíðnum, sum hann kallar eitt trupult mál, tí eingin kann liva við støðuni, sum hon er.

Spurdur um hann nú er kroystur at taka eina støðu av starvsfólkunum á Fornminnissavninum, sum sambært Útvarpinum skulu hava tosað við stórum stavum á fundi við landsstýrismannin mánadagin, sigur Jógvan á Lakjuni bert, at teir stavirnir vóru nokk ikki so stórir kortini.

Til tíðindini um, at Arne Thorsteinsson, fyrrverandi landsantikvarur, skal hava fingið at vita, at hann kann koma aftur til arbeiðis, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, at tað hevur einki við teir fundir, hann hevur verið á, at gera. Tað varð avgreitt á fundi millum Arna Thorsteinsson og Steffen Stumman Hansen, landsantikvar.

Arne Thorsteinsson váttar, at hann í brævi mánadagin fekk at vita, at burturvísingin, sum hann fekk við brævi í seinastu viku, er afturtikin. Hann var á fundi við landsantikvarin mánadagin og eisini til arbeiðis aftur á Fornminnissavninum sama dag. Týsdagin skuldi hann so aftur til arbeiðis sum vanligt, segði hann við Sosialin mánakvøldið.

Heldur ikki hann vildi bróta áløgdu tøgnina, sum partarnir í málinum eru samdir um.

Steffen Stumman Hansen, landsantikvarur, var sera stuttur í síni viðmerking, tá orð fekst á hann týsmorgunin:

»Der er absolut ingen kommentar.«

# Preeti Payal við nethandli

**Preeti Payal er spennandi handil í Vági við forkunnugum vørum, men nú ber til hjá kundum um alt landið, ja allan heim, at vitja handilin, uttan at ómaka sær ferðina til Vágs. Preeti Payal er nú eisini at finna á alnótini við nethandli við sínum vørum**

HANDIL
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Um ein ikki er staddur í Suðuroynni, so er ikki longur neyðugt at sigla allan vegin til Suðuroyar og síðani at koyra til Vágs, um ein hevur hug at vitja spennandi handilin Preeti Payal.

Preeti Payal er nú eisini at finna á alnótini við nethandli. Tað er bert at leita inn á heimasíðuna www.preetipayal.dk . Har sæst vøruúrvalið hjá Preeti Payal og til ber at bíleggja. Vøran verður send kundanum við Postverki Føroya og er bíðitíðin einar 3 dagar, um vøran er á goymslu.

– Lættari kann tað ikki gerast, meta systrarnar Jutta Helgadóttir og Sarina Augustinussen, sum eiga og reka handilin.

### Hugnaligur handil

Preeti Payal er hugnaligur handil, sum lat upp í oktober í 2002 í gomlum og hugnaligum handilshølum á Marknoyri í Vági. Og síðani hevur full ferð verið á. Umframt handilin í Vági, er eisini framsýningargluggi í hárfríðkanarhølunum hjá Lissi Mouritsen í J. Broncksgøtu í Havn. Og nú er so við nýggju heimasíðuni ein gluggi vendur út í allan heimin. Gomlu og sera hugnaligu handilshølini er sostatt nú útbygd við nýggjum sýnisglugga við nýggjastu tøkni, nevniliga eini virknari heimasíðu.

### Móti

Úrvalið er hugvekjandi og spennandi. Indiskt innbúgv og brúkaravinarligir og smartir brúkslutir.

Sum nakað nýtt fáast nú eisini mótaklæði til kvinnur í Preeti Payal . Talan er um merki sum Miss Sixty og Ducal-Design. Miss Sixty er vøra úr Italia, sum hevur lagt Europa fyri føtur sínar. Ducal-Design hevur sín uppruna í Danmark og hevur fyritøkan havt eina framgongd uppá 500%, síðani byrjanina fyri trimum árum síðani.

Sniðgevin handan eksklusiva merkið er 31 ára gamla Charlotte Anholm Troelsen. Hon byrjaði við at seyma taskur úr kópaskinni, sum hon bar út í ymsar handlar. Men stórur eftirspurningur var eftir vøruni og byrjaði hon tí egna fyritøku og fór eisini at sniðgeva klæði. Til klæðini nýtir hon eisini kópaskinn, svínaskinn og aðrar náttúruvørur og setir hetta sín serstaka dám á sniðini. Preeti Payal er einaumboð fyri Ducal-Design í Føroyum.

Nýggja heimasíðan www.preetipayal.dk er føroysk heimasíða, hóast endingina dk. Síðan er sera snøgg, greið og vælvirkandi og neyðugt er til dømis ikki at trýsta seg inn á einstøku myndirnar, tí tær koma fram í stórari støðd, um ein bert flytir pílin á teldurútinum á tær, so nú er bara at fara til handils á alnótini.



*Preeti Payal er nú eisini at finna á alnótini við nethandli. Tað er bert at leita inn á heimasíðuna www.preetipayal.dk . Har sæst vøruúrvalið hjá Preeti Payal og til ber at bíleggja.*



*Preeti Payal er hugnaligur handil, sum lat upp í oktober í 2002 í gomlum og hugnaligum handilshølum á Marknoyri í Vági. Og síðani hevur full ferð verið á. Umframt handilin í Vági, er eisini framsýningargluggi í hárfríðkanarhølunum hjá Lissi Mouritsen í J. Broncksgøtu í Havn*